**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 12. juni 2014**

Møttir: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Magni Bertholdsen, Eyðfinn Debes, Niels J. Thomsen og Jóhan Eli Poulsen. Martin í Nesi var burturstaddur.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um stuðul til fløguútgávu.** | Til 1:<br>Samtykt varð einmælt ikki at stuðla hesum. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um stuðul frá Suðuroyar Svimjifelag.** | Til 2:<br><br>Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 10.000,-. |
| **Mál 3:**<br>**Skriv frá borgara viðv. ánni niðanfyri Træbrúnna.** | Til 3:<br>Samtykt varð at siga frá, at áin verður tikin upp við jøvnum millumbilum. |
| **Mál 4:**<br>**Skriv frá borgara um skeltið í sunnaru trøð í**<br>**Sandvík.** | Til 4:<br><br>Samtykt varð at flyta skeltið niðan um stikið. |
| **Mál 5:**<br>**Skriv viðv. egningarskúrinum á matr. nr. 510.** | Til 5:<br><br>Samtykt varð at broyta orðingina í §3 í leigusátt-málanum til, at skúrurin kann brúkast til alt vanligt neystabrúk. |
| **Mál 6:**<br>**Fyrispurningur um málning av Ásmundar-stakki eftir Sigmund Petersen.** | Til 6:<br>Samtykt varð at boða frá, at kommunan er áhugað í at fáa upplýst ein minstaprís. |
| **Mál 7:**<br>**Nevndin - minningarhald í sambandi við skaðagrind í Sandvík.** | Til 7:<br>Bygdarráðið hevur hugsað um ein fíggjarligan karm á kr. 25.000,-. |
| **Mál 8:**<br><br>**Uppskot til javnbjóðis samstarvsavtalu um** | Til 8:<br><br>Samtykt varð, at øll atkvøðugreiðsla í sambandi |

| | |
|---|---|
| **Bú- og Heimatænastu í Suðuroy.** | við samstarvsavtaluna skal verða eftir fólkatali.<br>Viðv. ognarviðurskiftunum varð samtykt, at øll fíggingin má verða eftir somu treytum sum hjá hinum kommununum. Staðsetingin av umsiting-ini skal verða í Hvalba. |
| | |
| | |
| **Mál 9:**<br>**Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.** | Til 9:<br>Tekniska nevnd:<br>a) Umsókn um loyvi at stoypa garð við rekkverki á matr. nr. 31.<br>b) Skriv viðv. flytan av elsteyra.<br><br>Vega- og havnanevnd:<br>a) Skriv um træbryggju.<br><br>Trivnaðarnevnd:<br>a) Nýggj songjarborð til Sambýlið. |
| **Mál 10:**<br>**Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.** | Til 10:<br><br>Tekniska nevnd:<br>a) Samtykt at geva loyvi at seta trægirðing fram-við vegnum.<br>b) Samtykt varð, eftir tilmæli frá Teknisku nevnd, ikki at flyta steyran.<br><br>Vega- og havnanevnd:<br>a) Samtykt varð, eftir tilmæli frá nevndini, at um ætlanin er at hava hetta til atløgu- ella akkers-pláss, so er svarið nei.<br><br>Trivnaðarnevnd:<br>a) Nevndin kannar prísir á songjarborðum til komandi fund. |
| **Mál 11:**<br>**Ikki alment mál.** | Til 11:<br>Málið varð tikið av skránni. |